# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Svartkalvi. Túrur nr. 1824.
# Tíðarskeið: 23/5 - 3/6 – 2018.

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Jens Arni Thomassen og Sjúrður Hammer (túrleiðari).

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin. Eisini var hitin við botn skrásettur. Nytru- og magaprøvar vóru tiknir av svartkalva, toski og brosmu, og afturat vóru nytrur eisini tiknar av longu og blálongu.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper-grunnur, breitlar 120 m og Vágshurðar. Trolað varð vanliga í umleið 6 tímar. Miniloggarar vórðu nýttir til at máta sjóvarhita í trolinum.

**Um túrin:**
Farið varð av Havnini tann 24 mei, og sigldu vesturum, og royndu suðureftir vestanfyri Munkagrunnin. Síðani fylgdu vit ætlanini og trolaðu norðeftir eystanfyri. Leygardagin 2 juni kl 17:15 vóru vit fastir akkurát tá ið tað var byrjað at hála. Tað bleiv leingi roynt at fáa leyst og tann eini trolwire'urin slitnaði kl 18:30. Brimil bleiv tilkallaður á midnátt og kl 4 var hann á staðnum fyri at hjálpa, og trolið bleiv fingið upp. Trol, lemmar og temperaturloggarar vóru í góðum standi, men orsaka av eg hesum var túrurin styttur 1-2 dag, og vit vóru aftur á havnini sunnudag 3. juni tíðliga seinnapart.

29 støðir vóru trolaðar og 27 vóru góðkendar. Veðrið var sera gott allan túrin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini.
Tilsamans vóru 527 nytrir tiknar harav 460 vóru svartkalvanytrar. Svartkalvanytrurnar vóru frystar í distileraðum vatni. 148 magar vóru kannaðir, harav 132 svartkalvamagar. Tað mesta av svartkalvamagunum høvdu svartkjaft í sær.
Av sjáldsomum fiskum fingu vit eina reyða hornabrosmu (18240004), kryttling (18240006) og ein Lítlan tussafiskur (18240008), sum vóru frystir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 14. juni 2018.

**Fyribilsúrslit:** Túrurin gav samanlagt 291 kassar harav 267 kassar vóru av svartkalva. Samlaða veiðan er nakað minni enn farnu ár, tó nakað meir av svartkalva per hál var í ár (Talva 1).

**Talva 1**. Veiða (kg), og nytrur/magar tikin á túri 1824.

| Slag | 2018 veiða í kg, 27 hál | magar | nytrur | 2017 veiða í kg, 31 hál | Kg per hál 2018 / kg per hál 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| Svartkalvi | 15385.35 | 132 | 444 | 14219.07 | 1.242 |
| Tindaskøta | 1270.8 | | | 1747.8 | 0.835 |
| Trantkongafiskur | 825.9 | | | 3956.1 | 0.240 |
| Íshavsskøta | 260.19 | | | | |
| Toskur | 229 | 9 | 17 | 410.34 | 0.641 |
| Halahvassa skøta | 207.01 | | | 296.83 | 0.801 |
| Stóri kongafiskur | 175.13 | | | 540.98 | 0.372 |
| Svartkjaftur | 152.25 | | | 144.31 | 1.211 |
| Hvítaskøta | 146.04 | | | 27.49 | 6.100 |
| Brosma | 144.66 | 7 | 47 | 314.02 | 0.529 |
| Blágóma | 92.87 | | | 25.47 | 4.186 |
| Lálla | 35.74 | | | 146.11 | 0.281 |
| Klingruskøta | 29.87 | | | 38.43 | 0.892 |
| Upsi | 25.44 | | | 205.32 | 0.142 |
| Liri | 16.58 | | | 5.31 | 3.585 |
| Longa | 13.19 | | 1 | 42.61 | 0.355 |
| Blálonga | 12.95 | | | 171.4 | 0.087 |
| Hvassasprek | 11 | | | 44.81 | 0.282 |
| Lítli kongafiskur | 9.43 | | | 18.75 | 0.577 |
| Gamal fiskur | 8.74 | | | 26.46 | 0.379 |
| Havtaska | 8.67 | | | 107.15 | 0.093 |
| Úlvfiskur | 5.4 | | | 3.29 | 1.884 |
| Skrambul | 5.22 | | | 0.46 | 13.029 |
| Lítla brosma | 3.26 | | | 11.83 | 0.316 |
| Hvalspýggj | 1.85 | | | | |
| Kryttlingur | 1.73 | | | 0.58 | 3.425 |
| Agnhøgguslokkur | 1.27 | | | 3.47 | 0.420 |
| Gullaksur | 1.09 | | | 62.28 | 0.020 |
| Havmús | 1.03 | | | 13.77 | 0.086 |
| Lítla laksatobis | 0.93 | | | 0.25 | 4.271 |
| Eledone | 0.85 | | | | |
| Makrelur | 0.44 | | | | |
| Lítli tussafiskur | 0.41 | | | | |
| Laksatobis | 0.07 | | | | |
| Reyða hornabrosma | 0 | | | | |
| Hýsa | | | | 2.245 | |
| Trøllakrabbi | | | | 0.595 | |
| Rækja | | | | 0.299 | |
| Krossfiskur | | | | 0.18 | |
| **Tilsamans** | 19084.318 | | | 22587.961 | 0.970 |

Sjúrður Hammer